VW Golf GTI 2,0 Turbo:

# Reindyrkað koyrigleði




*VW Golf GTI 2,0 FSI Turbo sær út av nøkrum við t.d. stórum svørtum net-kølaragittari, 17" alufelgum við 225 profil dekkum og*

**Nú skjótt 30 ár eftir at fyrsti VW Golf GTI kom á marknaðin, er ein heilt nýggjur GTI komin í fimtu generatión. Bilurin fær framúr góð skotsmál frá motorjournalistum um allan heim**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Tað vóru VW ið skaptu GTI-klassan við Golf GTI, sum fyrstu ferð kom á marknaðin í 1976. Nú eru teir so aftur á marknaðinum við einum heilt nýggjum Golf GTI í fimtu generation.

Hesaferð við FSI motori og 200 hk við beinleiðis innspræning, turbo og intercooler. Talan er um ein sera kvikan bil við 6-trins girkassa og koyrir frá 0-100 km/t upp á 7,2 sek og toppferðin er 235 km/t.

Golf GTI sær eisini út av nøkrum við t.d. stórum svørtum net-kølaragittari, 17" alufelgum við 225 profil dekkum, spoilarum og dupultum útstoyti.

Eisini kabinan er í GTI stíli við t.d. nýdesignaðum sportssetrum, leðurbetrektum alu- ratti og girknøtti og alu-pedalum. Alt hetta er sanniliga ikki bara til pynt.

Ljóðið frá dupultu útstoytunum ger eisini sítt til, at bilurin fær ein rættuligan rally-dám. Har er onki at bíða eftir, tá traðkað verður á spitaran. Bilurin er sera kvikur.

Alt er sum tað skal, setrini eru væl formaði og stuðla heilt einfalt perfekt og kunnu stillast til persónar í øllum støddum.

Undirvognurin, ið er senkaður 15 mm í mun til ein vanligan Golf, livir fult upp til tey krøv, ið tað setur, at bilurin hevur 200 hk motor og toppferðin er ikki minni enn 235 km/t. Bilurin hevur gott og fast vegtak, hetta merkist serliga væl í svingum.

Bilurin fær framúr góð skotsmál frá motorjournalistum um allan heim. Við nýggja Golf GTI hava VW endurskapt GTI-aran frá 70 og 80-unum, sum eisini var fyrimyndin hjá kappingarneytunum tá.



*Ljóðið frá dupultu útstoytunum ger eisini sítt til, at bilurin fær ein rættuligan rally-dám. Golf GTI koyrir frá 0-100 km/t upp á 7,2 sek og toppferðin er 235 km/t*



*Kabinan er í besta GTI stíli við t.d. nýdesignaðum sportssetrum, leðurbetrektum alu-ratti og girknøtti og alu-pedalum*

## VW Golf GTI 2,0 FSI Turbo

| | | | |
|---|---|---|---|
| Motorurin. | 2,0 litur 4 syl. bensin 200 hk | Eginvekt: | 1.328 kg |
| 0-100 km/t: | 7,2 sek | Viðførisrúm: | 350 litrar |
| Toppferð: | 235 km/t | Prísur: | kr. 339.000,- |
| Bensinnýtsla: | 12,5 km/l | Søluumboð | Bilasølan v.Øssur Johannesen |
| Dekkstødd: | 225/45-17 | | Vegurin Langi |
| Stødd og vekt | | | FO-188 Hoyvík |
| Longd: | 420,0 cm | | Tel. 315354 |
| Breidd: | 176,0 cm | | www.bilasolan.fo |
| Hædd: | 148,0 cm | | |